## Vilja ikki hava Fogh

Danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, fær í hvussu er ikki stuðul frá Turkalandi, um hann stillar upp til starvið sum aðalskrivari í NATO. Sambært keldum eru turkar so harðliga ímóti danska forsætisráðharranum, at landið er til reiðar at brúka sín sýtingarrætt ímóti honum. Tayyp Erdogan, forsætisráðharri hevur ikki gloymt tíðindafundin hjá sær og Anders Fogh Rasmussen í Keypmannahavn í 2005. Tá vildi Erdogan hava eina kurdiska blaðkvinnu koyrda út. Tað vildi danski forsætisráðharrin ikki við tí úrsliti, at Erdogan rýmdi av fundinum. Turkar hava heldur ikki gloymt muhammedstekningarnar.



## Eingin semja við Taliban

Pakistanski forsetin, Asif Zardari, gjørdi í gjár greitt, at tað kemur ikki upp á tal at gera nakra loyniliga friðaravtalu við yvirgansgmenn sum eitt nú Taliban. Herfyri gjørdu teir lokalu myndugleikarnir og og muslimska leiðslan í Swatdalinum av at seta Sharia-lógirnar í gildi har. Síðani hevur Taliban bundið frið har og er givið við álopunum á pakistanska herin, og tað hevur fingið fleiri at halda, at myndugleikarnir hava gjørt loyniliga friðaravtalu við Taliban. Men tað er ikki gjørt og verður ikki gjørt, sigur forsetin.

# Rogn og livur upp á land

**Tjóðveldi hevur lagt uppskot fram á tingi um, at øll rogn beinanvegin og øll livur eftir eini skiftistíð skal takast umborð á øllum fiskifórum, sum hava fingið tillutað fiskidagar eftir lógini um vinnuligan fiskiskap**

TILFEINGI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Tórbjørn Jacobsen er framsøgumaður Tjóðveldis í fiskivinnumálum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað hevur verið nógv kjakast um spurningin, at fáa serliga rogn til høldar. Tosað hevur fyri tað mesta verið fyri hesum, men tað eru eisini teir, sum hava víst á tað trupla við at taka rogn, serliga umborð á skipum, ið hava kryvjimaskinu.

Sami trupulleiki ger seg eisini galdandi, tá talan er um at taka livur, men stendur tað til Tjóðveldi, so skal hetta tilfeingið eisini fáast til høldar. Við lóg.

Av teimum 19 nýggju uppskotunum, sum Tjóðveldi hevur lagt fyri tingið, telist eisini hetta, at øll rogn og øll livur skal takast við til lands. Tá talan er um rogn, skulu hesi takast beinanvegin, meðan tað fyri livrina er galdandi ein skiftistíð upp á fýra ár. í uppskotinum verður tað orðað soleiðis:

» ...og harafturat alla livur samsvarandi hesum skiftisleisti:
Í fiskiárinum 1. september 2009 til 31. august 2010 er avreiðingarskyldan avmarkað til 25%.
Í fiskiárinum 1. september 2010 til 31. august 2011 er avreiðingarskyldan avmarkað til 50%.
Í fiskiárinum 1. september 2011 til 31. august 2012 er avreiðingarskyldan avmarkað til 75%«.

Avmarkaða avreiðingarskyldan er galdandi samanlagt fyri alt viðkomandi fiskiárið«.

Í uppskotinum verður sagt, at lógin skal koma í gildi, tá nýggja fiskiárið byrjar 1. september 2009.

### Motivatión virkar ikki

Í viðmerkingunum til uppskotið sigur Tjóðveldi, at átakið til tess at fáa fiskimenn at taka livrina til lands, ikki hevur virkað eftir ætlan. Hugskotið var annars, at tey fiskifør, sum tóku livur, skuldu fáa tillutað eyka fiskidagar.

»Úrslitið av hesum átaki prógvar, at lógarbroytingin ikki motiveraði vinnuna. Hetta sæst sjónliga aftur í nøgdini, sum síðani er komin til høldar og til virkingar. Hon minkar heldur enn veksur«, sigur Tjóðveldi millum annað í viðmerkingunum.

Táverandi minnilutin í vinnunevndini, Tórbjørn Jacobsen og Heidi Petersen, mælti til, at ein skiftistíð var sett inn í lógina, men hetta vann ikki frama.

Tórbjørn Jacobsen tók málið upp aftur, tá hann gjørdist landsstýrismaður í fiski- og tilfeingismálum í CHE-samgonguni, men sum kunnugt gjørdist hesari samgongu ikki langt lív lagað.

Nú verður so aftur roynt við hesum uppskotinum, ið Tjóðveldi sum andstøðuflokkur leggur fram. Ein av orsøkunum til, at hetta uppskot verður lagt fyri tingið er at finna í viðmerkingunum:

»Meirilutin, sum feldi uppskotið á sinni, og mong onnur við teimum halda, at løggáva á økinum ikki er rætti vegurin at fara. Tingið er øðrvísi mannað nú, og tí kann væntast, at ein hugburðsbroyting er hend, til frama fyri uppskotið, og harvið til miklan frama fyri búskapin hjá vinnuni og samfelagnum«.

Løggáva ella ikki, so hevur tað higartil ikki borið til at fingið fiskiskip sum heild at taka serliga livrina við til lands. Við rognunum er støðan kanska eitt sindur frægari, men neyvan heilt nøktandi, tí ivaleyst verður ein – kanska enntá stórurm – partur ikki tikin til lands.

### Eitt stig á leiðini

Í viðmerkingunum verður eisini nomið við búskaparliga potnetialið, sum liggur í at taka hesa rávøruna til lands. Sagt verður:

»Fiskimálaráðið hevur í mong ár rikið tríggjar almennar granskingarkjarnur, og tilmælini um júst viðurskiftini, sum hetta uppskotið snýr seg um, eru rættiliga greið. Tað liggur eitt øgiligt búskaparligt potentiali í tí partinum av tilfeinginum, serliga av Føroyagrunnunum, sum í stóran mun verður tveitt fyri borð aftur. Av nøgvum ymiskum orsøkum hava vit skyldu til at taka hendan partin av tilfeinginum til lands«.

Og sagt verður víðari:

» Ásetingin frá heimssamfelgnum, um burðardygga veiði, er longu nú somikið konsekvent, at vit undir ongum umstøðum sleppa undan, at taka dik á okkum í málinum«.

Sambært viðmerkingunum til uppskotið eru rogn og livur bara eitt stig á leiðini, tí sagt verður, at tað rætta hevði sjálvandi verið at alt verður tikið til lands.

»Tað kann kanska tykjast løgið, at uppskotið bara fevnir um rogn og livrar, og hartil at ein skiftistíð er løgd inn í avreiðingina av livrum. Sjálvandi hevði tað rætta verið, at alt var tikið til lands, og eigur at verða soleiðis fyriskipað frá almennari síðu, at lógin um vinnuligan fiskiskap ger greiðar ásetingar um, at skip sum fáa almenn veiðiog fiskiloyvi, skulu fremja neyðugar tøkniligar innstallatiónir, til tess at hetta gerst møguligt«, verður sagt í viðmerkingunum.

Um orsøkina til, at uppskotið í fyrsta lagi bert umrøður rogn og livur, verður sagt í viðmerkingunum:

» Av tí at rogn og livur er ein stórur partur av tí sum ikki kemur til høldar, og eru av serligum búskaparligum týdningi, hava vit miðað eftir, at fáa hendan partin til høldar beinanvegin«.

Tjóðveldi ásannar, at tað tekniskt enn skapar trupulleikar at taka livrina umborð á skipum við kryvjimaskinu, og tí verður mælt til eina fýra ára skiftistíð. Og at enda verður enntá nevnt í viðmerkingunum, at hóast stuðul er eitt ókvæmisorð, meiri ella minni, so er flokkurin ikki heilt avvísandi í hesum sambandi.

»Tó átti mann at umhugsað nóg rúgvismiklan og skipaðan almennan stuðul til menningina av tøkniligum nýbrotum sum hesum, ið nú eru ávegis viðvíkjandi m.a. kryvjimaskinum, sum kunnu hava stóran, fyri ikki at siga heilt avgerðandi fíggjarligan týdning fyri fiskimenn, vinnuna og samfelagið«, sigur Tjóðveldi at enda í viðmerkingunum til uppskotið.